## DAGSINS MEINING

# Gleðin at geva og fáa

Seinastu tíðina hevur verið gjørt eitt stórt innsavningararbeiði kring landið. Fólk úr teimum trúðarsamfeløgini hava staðið fyri hesi innsavning, sum hevur til endamál at hjálpa neyðstøddum og fátøkum børnum og ungum í eitt nú fyrrverandi kommunistalondunum í Eystureuropa. Beinleiðis orsøkin er átakið Operation Christmas Child, og ikki kann sigast annað enn, at fólk hava tikið væl undir við átakinum.

Átakið Operation Christmas Child hevur mong ár á baki, og í fjør vórðu savnaðar yvir 6,6 milliónir skógvaeskjur við tinganesti í ymsum londum, sum vórðu latnar líðandi børnum í 95 londum. Felagsskapurin aftanfyri Operation Christmas Child er Samaritan's Purse, ið er ein kristin hjálparfelagsskapur.

Í høvuðsheitum snýr átakið seg um at fylla eina tóma skógvaeskju við ymiskum til drong ella gentu í einum ávísum aldursbólki. At brúka júst eina skógvaeskju hevur ta frágreiðing, at tær eru javnt stórar, og tí verður ikki mismunur gjørdur á støddini á gávunum.

Gávueskjurnar eru pakkaðar inn í jólapáppír, tí hetta skal verða ein jólagáva, sum umframt at gleða barnið við tí sum er í eskjuni, eisin skal minna tað á bestu jólagávuna, sum givin er. Lesnaður verður lagdur við í eskjunar í Bretlandi, og hesin lesnaður greiðir frá um Gud, sum gav heiminum son sín Jesus og hvørs føðing vit minnast á jólum.

- Hetta kemur sera væl við hjá teimum, sum fáa hetta, tey eru sera fegin um tað, og vit, sum geva, eru eisini glað fyri at kunna rætta teimum ein hjálpandi hond. Nakað soleiðis segði ein av teimum mongu ungu føroyingunum,sum hava staðið fyri innsavningini, við ein av loftmiðlunum. Og tað er greitt, at hetta er ein vinnarastøða fyri bæði gevara og móttakara. Báðir partar fáa nakað burtur úr. Tað at geva og móttaka skapar eina ærliga og sunna gleði. Tað er mennandi, og tað er uppbyggjandi. Tað byggir brýr og birtir undir virðing og tolsemi. Nakað vit øll hava brúk fyri. At móttakarin í sama viðfangi verður upplýstur um Jesus og tey góðu virði hann stóð fyri er bara gott.

Tað er sum so einki nýtt í tí, at føroyingar savna inn pengar og lutir at lata fátækum og neyðstøddum í øðrum londum. Hóast hetta kann kennast sum ein dropi í havinum, so er hetta nakað sera stórt og virðismikið fyri tey, sum móttaka. Og fyri tey, sum geva.

Hóast búskaparliga støðan versnar í Føroyum, so er kortini greitt, at vit hava og liva í yvirflóð, tá hugsað verður um okkara brúksvanar, har klæði og ognarlutir verða skift út sum onnur skifta hosur. Tí finst her heima ein hópur av lutum og tingum, sum vit antin hava vrakað ella g(l)oymt, og sum nú kunnu koma øðrum væl við. Gott í tykkum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kommunueindin

### Tað sigur C sjálvt

**Jógvan Finnur Poulsen**


VAL04

Í stuttsøguni "Tann dagin um Múlan" sigur Heðin Brú soleiðis: "Men tá tann blíða Klaksvíkin kom vann hon uttan svørðslag."

Hvat hevur hetta við kommunuvalið 2004 at gera? Einki, men hetta kann kortini nýtast sum mynd um eina aðra vík her í oynni. Men tá tann blíða Runavíkin kom vann hon uttan svørðslag!

Hetta dettur fram í hugan, nú fleiri bygdir kropp á kroppi tysja út at lima seg inn í stórkommununa á eystara armi Skálafjarðar.

Havi leingi hugsað um eindina her hjá okkum Fuglafjørður, Gøta, Leirvík. Tann blíða Klaksvíkin dró og dregur alsamt fólk til sín, ja bygdir í Norðuroyggjum. Sambandið undirsjóvar kemur skjótt — hvussu verður við Leirvík? Uttan iva flyta fólk vesturum fjørðin at búseta seg, og tí er spurningurin — fara leirvíkingar at brellast eftir samstarvi eysturyvir?

Í Gøtu hava røddir verið at hoyrt, sum tráa úteftir, meðan aðrar vilja hendavegin.

Úti í heimi verða stórar eindir skipaðar. Eysturlandið í Íslandi er ein stórkommuna, og tað er ikki av tilvild. Teir vita, at sam-anhald merkir styrki. Heimsins stórsta oyggj Grønland verður ætlandi skipað í 7 kommunur.

Samstarvsrák er týðuligt og lítið batar her at rógva andróður.

Samstarv gongur allar vegir og óttin fyri at missa vald er grundarleysur.

Samanhald hevur altíð styrkt og avbyrgingarpolitikkur ongantíð hildið.

Hetta er stórmál, sum komandi býráð noyðist at taka støðu til. Hvussu langt verður farið er altíð ein samráðingarspurningur.

Lat farið vera farið. Lat ikki gjárdagin marva burturav hesum degnum. Lat okkum rætta út bróðirhond, tí einki kemur í ein knýttan neva!

Eindin her F.L.G. er fyri mær náttúrlig, landafrøðilig, búskaparlig sera sterk.

Styrkt samanhald — størri møguleikar!

Veljið tí framtíðina

# Smábarnafamiljur í Tvøroyrar kommunu

**Jonhild A. Nielsen**
*Valevnið á lista C*

Eg haldi at um ein smábarnafamilja skal støðast og klára seg í dag, mugu vit royna at gerða alt hvat vit kunnu fyri at hetta skal bera til . Vit kunnu byrja við at bjóða sysktinarabat í barnagarðinum, dagrøktini, og frítíðarskúlanum. Hetta hevði lætt munandi um hjá nógvum familjum.

Nógvar lappaloysnir eru gjørdar, á okkara stovnum og skúlum tey seinnu árini. T.d er Tvøroyrar Skúli ikki í serliga góðum standi. Takið er blivi skift á Tvøroyrar Skúla, men hetta er ikki nóg mikið. Átrokandi hølistrupulleikar eru, og tað má loysast sum skjótast.

Barnagarðurin hevur nú verið í nógv ár og er hann ikki rættiliga tíðarhóskandi. Eitt spælipláss sum er alt ov lítið og ikki eru spæliamboðini børnini hava at spæla við uttandurða í serliga góðum standi.

Stóra parkeringsøkið framman fyri útibarnagarð, frítíðarskúla, og dagrøkt, skal gerðast tryggari fyri okkara børn at ferðast á. Her er rættiliga nógv ferðsla á hesum økinum, og tað er her øll skúlabørn og tey, ið eru yngri ferðast dagliga.

Gott val.

# Berjabrekka 3 skal takast fram aftur!

**Elin Lindeskov**
*býráðslimur*
*valevni Javnaðarfloksins*
*www.lindenskov.com*


VAL04

Landsstýrismaðurin í íbúðarmálum Hans Pauli Strøm hevur boða frá, at tað verður arbeitt við eini nýggjari lóg um íbúðarbygging. Sambært tí, sum er komið fram, ætlar landstýrismaðurin, at tað skal gerast lættari at byggja íbúðir. Tað skal verða lættari at seta á stovn íbúðarfeløg. Og tað skal vera lættari at skaffa fígging til íbúðarbygging.

Við nýggju lógini verður nógv lættari og bíligari hjá kommununi at skipa íbúðarpolitikkin. Tóshavnar kommuna og Íbúðargrunninum hjá Húsalánsgrunninum stovnaðu í 2000 sjálvsognarstovnin Berjabrekka 3. Endamálið við sjálvsognarstovninum var at útvega og reka íbúðarhús í kommununi. Sjálvsognarstovnurin læt frá sær eina ætlan í mai 2001. Tann ætlanin fevndi um 68, tvey til fimm rúms íbúðir. Íbúðirnar skuldu byggjast soleiðis, at fyrilit skuldi takast fyri fólki við serligum tørvi. Tó soleiðis, at rætturin til íbúðirnar ikki bert var tilskilaður ávísum bólki. Men øll skuldu hava møguleika at búgva har.

Ætlaða byggingin steðgaði upp, tí kostnaðurin at búgva har gjørdist alt ov høgur undir verandi lóg. Fyri at byggja hesar íbúðir, skuldi stovnurin rinda fult mvg og eingin rentustuðul kundi lætast, tí rentustuðulin bert er ætlaður sethúsaeigarum.

Nú nýggj lóg er á veg, eigur kommunan beinanvegin at taka byggiprogrammið fyri Berjabrekku 3 fram aftur. Rætta tað til, sum er neyðugt. Berjabrekka 3 kann so verða fyrsta stigi til ein fjøltáttaðan bústaðarpolitik í Tórshavnar kommunu.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Komandi fýra árini

**Inga Dahl**
*valevni fyri Fólkaflokkin*


VAL04

Týsdagin 9. november skal nýtt býráð veljast.

Eitthvørt nýtt býráð má byggja víðari á tað støðið, sum fráfarandi býráð hevur lagt.

Tað býráðið, sum nú leggur frá sær, hevur við fólkafloksleiðslu lagt eitt gott støði, hevur ment kommununa á øllum økjum og goldið alla skuld.

Men vit standa ikki í stað. So hvørt eitt mál er loyst, eru onnur fyri framman, og vit eru alla tíðina ávegis til at gera kommununa betri og betri hjá hvørjum einstøkum borgara.

Fólkaflokkurin bjóðar seg fram við einum fullmannaðum lista A

Á listanum eru 17 valevni. Hetta eru kvinnur og menn við kunnleika og lívsroyndum á øllum økjum. Vit kunnu nevna mentan, almannamál, teknisk mál, vinnumál, heilsumál og fíggjarmál.

Ein sterk umboðan av lista A í býráðnum borgar fyri einari tryggari framtíð í kommununi.

Vit vilja framhaldandi føra ein skynsaman fíggjarpolitikk, soleiðis at kommunan sum heild, og eisini hvør einstakur fær mest møguligt afturfyri hvørja goldna skattakrónu.

Setið kross við lista A ella eitt av valevnunum á listanum.

Gott val

# Kommunuval 2004

**Jógvan Krosslá**
*Borgarstjóri*


VAL04

Góðu Vágbingar, nú stundar aftur til kommunuval, og eru vit nógv valevnir, sum bjóða okkum fram til at stýra kommununi komandi 4 árini, ivaleyst vilja øll gera sítt til at tað skal gangast sum best í kommununi, soleiðis at fólk kunnu trívast her á staðnum. Borgarin ynskir sjálvsagt at tað hendir nakað í kommununi og at arbeiði verður til flest allar hendur, hvat kann so ein kommuna gera við tað. Ein kommuna, sum ynskir lív og trivna, eigur at skapa karmar fyri: vinnulív, barnaansing, eldrarøkt, ítrótt, skúlum, eins og fyri sosialum- og mentunnar tiltøkum annars.

Vágs kommuna roynir eftir førimuni at liva upp til hesar treytir, vónandi kemur tað at síggjast aftur.

Eg vil ynskja vágbingum eitt gott kommunuval, tann 09. november 2004.

# Viðmerking til greinina Havnin heldur útjaðarunum uppi!

**Svenning Borg**
*Vágur*
*á lista B*


VAL04

Í Sosialinum 28okt. hevur Elin Lindenskov grein,sum hon kallar;Havnin heldur útjagarunum uppi.

Fari fyrst at spyrja Elin, hvørjum heldur Havnin útjaðaran uppi við?

Kundi verið áhugavert,at fingið at vita frá Elin, hvussu stóran part av tí føroyska útflutningsvirðinum íð Havnin stendur fyri.

Sum øllum kunnugt,so er vælferðin treytað av tí útflutningi sum okur hava, okur liva ikki longi av,at umsita hvønn annan.

At virðisøkingin verður skapt í Havn,má vera ein joke, hvørjum skal Havnin virðisøkja av?

Hvørjum betalir Havnin útjaðaranum stuðul frá? Hevur Tórshavnar býráð ein grunn, sum eitur stuðul til útjaðaran og hvør betalir inn í henda grunn?

Nei, uttan útjaðaran var ongin Havn, so einkult er tað.

Havnin livur fyrst og fremst av almennari umsiting, útjaðarin verður umsitin í Havn og eigur hettar at verða broytt, og sum eitt av valevnunum til kommunuvalið í Vági, í størsta útjaðaranum í Føroyum, Suðuroy, er eitt av málunum, at Suðuroyggin verður umsitin í Suðuroy, havi ongantíð meint tað vera rætt,at Suðringar skulu flyta til Havnar fyri at kunna umsita Suðringar í Suðuroy.

Vóni at Suðringar kunnu finna saman til eina felags umsiting av oynni,tað hevði givið nógvar stórar stjóralønir, fulltrúalønir, løgfrøðingarlønir og skrivstovulønir, fyri ikki at tala um okursleiguna av hølum, sum tað almenna betalir í Havn, men sum kundi verið nógv bíligari her suðuri.

Vil heita á Vágbingar um at hugsa seg væl um,nú býráðsval verður,um at velja fólk inn í býráðið, sum vilja virka og skapa nakað, lat okur sleppa av við klandur og sjálvsøkni og saman við hinum kommununum í oynni, at lyfta Suðuroynna upp á tað støðið, sum hon natúrliga eigur at vera á!

Gott val.

# Hví stillar Miðflokkurin upp til Tórshavnar býráð?

**Elin N.W. Tausen**
*Valevni Miðfloksins til Tórshavnar Býráð.*


VAL04

Hetta er ein spurningur, sum kanska nógv seta sær sjálvum í hesum døgum. Er Miðflokkurin ikki bara áhugaður í etiskum málum, so sum fosturtøku, skrásettum parlag o.l. málum?

Hvat skal ein tílíkur flokkur gera í býráðs-politikki?

Mítt svar er, at heilt avgjørt skal Miðflokkurin luttaka í býráðspolitikki. Sjálvandi hava vit eina greiða støðu til omanfyrinevndu mál, men tað eru ikki einastu mál sum vit virka fyri.

Tvey av okkara høvuðsmálum hava altíð verði trivnaðurin hjá familjuni og teimum sum hava serligan tørv. Nú barnaansingarøkið er lagt út til kommunirnar, og eldraøkið nok er á sama veg, er tað sera tídningarmikið, at vit fáa høvið at gera okkara ávirkan galdandi í kommunini, so vit kunnu vera við til at mynda karmarnar sum virka verður útfrá.

Næsti spurningur er, kann ein lítil flokkur sum Miðflokkurin hava nakra ávirkan í býráðnum? Sjálvandi! Hetta hava vit prógva í Løgtinginum við málum so sum, Løgtingsins umboðsmanni, loftmiðlafrælsi osv. Miðflokkurin er ein lítil flokkur, sum setur spor eftir seg í føroyska samfelaganum.

Vit hava tørv á tínum stuðlið, eins og tú hevur tørv á okkum til at standa á varðhaldi.

Ver tú við til at geva okkum møguleikan, til at mynda Tórshavnar kommunu tey næstu 4 árini.

Set tín x við lista H.

# Tíverri – einki er at rána

**Henrik Old**



Tað tykist ikki sum øll eru komin burturúr tjóðveldisdreymaverðini. Hergeir Nielsen boðar í bløðunum frá at samgongan hevur veri ránsferð í Suðuroynni. Kann ein persónur, sum í 6 ár hevur verið í meiriluta á løgtingi pástanda, at nøkur arbeiðspláss eru at rána úr Suðuroynni.

Fyrsta treytin fyri einum væleydnaðum ráni er væl tann at nakað er at rána. Aftaná seks ár við tjóðveldisflokkinum í samgongu, er ikki eitt alment starv sett í syðru helvt av Suðuroynni, ikki eitt starv. Tað tykist sum hvørjaferð Hergeir Nielsen er í minniluta í løgtinginum, veit hann alt um hvørji størv skulu leggjast í syðru helvt í Suðuroy, har so sanniliga er brúk fyri teimum.

Tá ið so Tjóðveldisflokkurin er í meiriluta í løgtinginum, gloyma teir alt um, at leggja nøkur almen størv í syðru helvt í Suðuroynni. Mint eigur at verða mint á at Tjóðveldisflokkurin hevur siti í meiriluta í seks tey seinastu árini, har fýra av hesum eru bestu inntøku ár, nakar veit um. Hesi seks ár er ikki eitt starv lagt í syðru helvt. Samtíðis hevur Hergeir Nielsen atkvøtt fyri, at stívliga 1.000 almen arbeiðspláss hava sæð dagsins ljós í miðstaðar økinum (hetta er met).

Umframt hetta so lovaði Tjóðveldisflokkurin Vágs kommunu 9-10 mió til havnaútbygging. Tá ið alt kom til alt, vórðu einans játtaðar 5 mió. Umberingin fyri at ikki meir bleiv játtað varð, at Sjálvstýrisflokkurin ikki vildi verða við.

Hendan samgongan bjargaði 3 mió í sínum fíggjarlógaruppskoti í ár, og har atkvøddi Sjálvstýrisflokkurin fyri, so kann ein og hvør sjálvur rokna út, hvussu eftirfarandi umberingin var.

Tað er væl skiljandi at fjáltur er komin á Hergeir Nielsen og tjóðveldi nú sitandi samgonga er samd um, at nøkta stóra røktarheimstørvin í Suðuroynni, sum er yvir 50 pláss.

At so 40 kvinnur fáa fast arbeiði í hesum sambandi, ger so vónloysi hjá tjóðveldinum uppaftur størri. At hugsa sær til, at 40 vællønt føst størv verða at fáa í syðru helvt í Suðuroynni, tykist at níva sera fast aftaná seinastu feitu seks árini við ongum starvi.

Uppskot og hugskot um at flyta nakrar hundrað túsund bjargar ongum, her skal annað til og tyngri tøk takast.

Tað tykist sum tað nívur tjóðveldi sera fast at samgongan er samd um, at her mugu takast stór tøk m.a. við oman fyri nevdu ætlan um røktarheimsbygging, miðnámsskúla við almanna- og heilsuskúla við teimum mongu møguleikum fyri alla Suðuroynna í kjalarvørrinum.

At sita uttanfyri meðan tunnil verður bygdur millum Hov og Øravík svíðir sjálvandi fast, men er væl ein avleiðing av tí ein sjálvur hevur valt.

Hergeir Nielsen verður helst tann seinasti sum sær í eyguni, at flyting av nøkrum fáum hundrað túsund krónum hendan vegin ella handan vegin, hvørki ger frá ella til í teimum trupulleikum Suðuroyggin er í nú.

Tað skulu stór og tung tøk takast, umframt hesi omanfyri nevndu. Tað gerst ikki við, at tað nívir hjá onkrum at samgongan er samd um, at hesi tøk skulu takast. Nú er nokk tosa og skriva uttan at eitt arbeiðspláss er komið burturúr.